gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðadeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# At skrumbla seg til máls

## *Oddagrein*

Fleiri ferðir er nú prógvað, at okkara stýrisskipanarlóg ikki virkar á nøktandi hátt. Tað gongur næstan ikki dagur, at ikki okkurt er uppi um brot á okkara stýrisskipan.

Løgmaður hevur í longri tíð havt stórt stríð av hesum - og hevur landsstýrið ikki verið fullmannað í fleiri mánaðir, tí onkur heldur, at ráð ikki eru til at seta ein landsstýrismann, samstundis sum ein annar fyrrverandi landsstýrismaður fær løn uttan at vera til arbeiðis.

Í gjár skar løgmaður tó ígjøgnum - og gjørdi av kortini at tilnevna nýggja landsstýrismannin. Við Sosialin sigur hann, at hetta so má fáa tær avleiðingar, ið fara at vísa seg. Sjálvsagt skal løgmaður skera ígjøgnum - og spennandi verður at síggja úrslitið

Tað ber jú ikki til, at embætisfólk og politikarar á henda hátt skulu vera noydd at togast um viðurskifti, sum í øðrum londum eru púra greið, til onkur advokatur má koma upp í leikin sum kanningarstjóri at loysa knútin.

Tá tað er so greitt, at stýrisskipanarlógin ikki virkar á nøktandi hátt, so er bert eitt at gera – at endurskoða hana. Hetta landsstýrið hevur sett sær fyri at skipa landið sum fullveldi, har vit sjálv hava ábyrgd á øllum økjum.

Kortini kann tað tykjast heldur rangvørt at arbeiða við at gera eina føroyska grundlóg, samstundis sum okkara stýrisskipanarlóg ikki virkar á nøktandi hátt. Føroyingurin hevur ilt við at skilja, at ein grundlóg skal loysa allar hesar trupulleikarnar.

Tað sama kann sigast um kjakið um skiftistíðina. Landsstýrið setur øll segl til at hon skal gerast so long sum gjørligt. Hví ikki venda spurninginum við - og siga, at vit fyrst skulu gerast fíggjarliga sjálvbjargin - áðrenn vit taka fulla stigið til fullveldi.

Okkum tykir, at tað ofta verður arbeitt í panikki. Størri dentur verður lagdur í at náa ávísum málið, heldur enn at greiða gøtuna, so vit koma heilskapað fram at málinum.

***Sosialurin***

# Rúni Brattaberg á konsertferð



*Rúni Brattaberg fer komandi dagarnar á konsertferð kring landið*

Meðan Rúni Brattaberg hevur summarfrí frá operasenuni í Zürich, hevur hann fýra summarkonsertir í komandi viku. Tær verða í Framtíðini í Vági sunnudagin, Meiarínum í Havn mánakvøldið, í Vestmanna skúla týskvøldið og í Fuglafjarðar skúla hóskvøldið.

Í konsertskránni hesaferð eru sangir, sum skulu verða við á fyrstu solofløguni hjá Rúna - hon kemur væntandi út til jóla. Kend løg eftir Regin Dahl, Sunleif Rasmussen, Jean Sibelius, Franz Schubert og G. F. Händel eru á skránni, og tónaskøld hava sett løg til yrkingar hjá m. a. Hans Andreas Djurhuus, Pól F. Joensen, William Shkespere, Runeberg og Goethe.

Stykki úr kendu operaini Gandafloytuni hjá Mozart verða eisini framførd. Samanlagt er hetta ein spennandi samansett skrá við nógvum løttum særri stykkjum, har sungið verður á føroyskum, svenskum týskum, russiskum og italsku m.

Við sær til Føroya hevur Rúni klaverleikaran, Hans Otto Ehrstrøm, teir hava arbeitt saman í Zürich hetta seinasta árið. Hans Otto var eisini við, tá Die Winterreise hjá Schubert varð framførd fyrstu ferð í Føroyum á páskum í ár.

# Konsert við Cantabile

Í morgin, sunnudagin, klokkan 16 fer gentukórið Cantabilé at hava konsert í Norðurlandahúsinum.

Á skránni verða eitt nú gamlir og nýggir føroyskir sangir.

Pauli í Sandagerði stjórnar kórinum, eins og hann hevur gjørt tað nú í nógv ár.

Bretska oljufyritøkan BPAMOCO hevur stuðlað kórinum, sum dagarnar 1. — 13. august 2000 fer at verða við á tiltaki í Aberdeen.

# Einki timbur í Kollafirði

Í skrivi til kundar boðar Langastandur Timburhandil í Kollafirði frá, at teir gevast við virkseminum. Samstundis nýtir stjórin, Christian Christiansen høvi at takka kundunum fyri gott og trúfast samstarv øll hesi árini.

Við útvarpið segði hann, at kappingin frá teimum stóru og frá internet-timburhandlum í grannalondum, hava elvt til, at virksemið hjá teimum minkaði. Skuldu teir standa seg í kappingin, vórðu teir noyddir at gera stórar íløgur í eina nýggja høll, og hetta hildu teir ikki vera ráðiligt. Tí gevast teir at selja timbur í Kollafirði

# Hurluvasi á Meiarínum

*Nú ólavsøkan nærkast er rættuligaur Hurluvasi Meiarínum, og tað fer tað at verða um alla ólavsøkuna. Og sum ikki einaferð eru tað børnini, sum standa ovast á listanum*



Á ólavsøku verður barnaleikurin Hurluvasi á Meiarínum framførdur á Meiarínum.

Longu hósdagin 27. juli kl 18 verður fyrsta sýning, og síðani verður spælt um ólavsøkuna. Leikurin Hurluvasi á Meiarínum er skorin eftir sama leisti, sum Hurluvasi í Lítluvík, ið varð sera væl móttikin bæði av børnum og vaksnum, og sum ofta verður nevndur tá ið tosað verður um barnaleikir. leikurin er fyri øll børn og barnsligar sálir, siga fyrireikararnir.

Hurluvasi á Meiarínum er skemtileikur, ið snýr seg um ein ungan mann, sum verður forelskaður í tí vøkru Smeraldinum, men hetta vil pápi hennari ikki hoyra talan um og roynir av øllum alvi at forða teimum at koma saman - og hetta førir við sær ein øgiligan hurluvasa.

Eins og í Lítluvík á sinni eru orðini fá, men tónleikurin er nógvur, og bæði verður klatrað, runnið og dansað.

Leikstjórnað hevur Súsanna Tórgarð, og tey ið leika eru Birita Mohr, Egi Dam og Hans Tórgarð. Hesaferð hava tveir ungir evnaríkir menn, Sámal Black og Heiðrikur á Heygum, málað ein litríkaan og sera stuttligan pall. Stamen Stantchev hevur lagt tónleikin til rættis.

Fyrsta sýning verður tann 27. juli, og tríggjar sýningar verða á ólavsøku, síðani verður spælt fram til 1. august.

# Tøkk

Øllum tykkum, ið á ymiskan hátt gjørdu okkum gullbrúdleypsdagin so hugnaligan og gleddust saman við okkum, takka vit hjartaliga.

*Bestu heilsanir*

**Jona og Eivind Gudmundsen**